Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Installatørútbúgving í Føroyum

Spurningar:

1. Eru ætlanir um at seta installatørútbúgving á stovn í Føroyum?
2. Um ja, er nakað fyrireikandi arbeiði gjørt?
3. Hvør er metti kostnaðurin, og hvussu skjótt kundi ein slík útbúgving byrjað í Føroyum?

Viðmerkingar:
Í sínum politiska arbeiði møtir undirritaða javnan fólki, sum geva sítt íkast til kjakið um, hvørjar útbúgvingar tað hevði verið skilagott at kunna tikið í Føroyum. Ítøkiligi tørvurin á úbúnari arbeiðsmegi í handverksliga geiranum kann tykjast eyðsýndur, t.d. innan byggivinnuna og tøkniliga økið. Tað er ikki so sjáldan, at tey, sum hava tikið eina yrkisútbúgving á teknisku skúlunum í Føroyum, hava hug til at taka eina útbúgving omaná, sum tey síggja tørvin á her í samfelagnum, og sum tey halda vera áhugaverda og hava evnini til.

Nógvir elektrikarar verða útbúnir í Føroyum, og fleiri tykjast hava áhuga í at taka innstallatørin omaná. Men tað er kanska ikki so høgligt at skula fara uttanlands, tá ein hevur fest røtur í føroyska samfelagnum. Men tað kundi kanska verið viðkomandi at gjørt eitt lyft fyri handverkið við at sett útbúgvingar í verk, sum geva møguleika at byggja omaná handverksútbúgvingina og harvið fáa fleiri, sum kunnu standa fyri prosjektum og kunnu góðkenna arbeiði. Um hugt verður at installatørútbúgvingini í Danmark, so tekur hon tvey skúlaár og er á vinnuskúlum (erhvervsakademi). Undir lestrinum lærir ein ymiskt, sum hevur týdning fyri at gera installatiónir og anlegg: um prosjektering, ráðgeving, at útføra og dríva elektriskar installatiónir, um at seta í verk intelligentar loysnir í bygningum og anleggum, um optimering, trygd og høgleika. Prosjektleiðslu, entreprisuleiðslu, fyriskipan, leiðslu, keypmansskapsfatan, dygd, trygd og umhvørvi eins og samskiftis- og miðlatøkni. Elektrotøkni, talgild prosjekteringsamboð, góðskutrygd, skjalfesting og elektrontøknilig ástøði og støddfrøði eru eisini grundleggjandi partar av hesi útbúgving.

Vinnuhúsið sigur á síni heimasíðu, at «útbúgving er týdningarmesta íløgan í produktión», og at «samfeløg broytast støðugt, og eingin ivi er um, at talgildingin og automatiseringin broyta tørvin á førleikum». Í Vakstrarforumi frá 2022 er eitt av tilmælunum at «regluliga endurskoða og seta á stovn yrkisútbúgvingar, har grundarlag er fyri tí og seta á stovn nýggjar yrkisútbúgvingar at møta framtíðini innan m.a. grøna orkuskiftið».

Hetta kann alt sýnast sera viðkomandi fyri føroyska arbeiðsmarknaðin og føroyska vinnulívið, so tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 23. apríl 2025

Hanna Jensen